# Avhending av kt-skipanum til Tjóðskjalasavnið

Samband: skjalasavn@skjalasavn.fo • tlf. 340540 • Beinleiðis til kt-arkivar: +298 340542

# Innihald

Inngangur........................................................................................ 3

Endamál.......................................................................................... 4

Hvat er ein talgild skjalasavnsskipan.................................................. 5

Fráboðan og góðkenning av kt-skipanum ........................................ 6-8

Hvussu gongur eitt avhendingarmál fyri seg...................................... 9

Góðskutrygging í kt-skipanum .................................................... 10-11

Útgevari: Tjóðskjalasavnið • Redaktión: Sámal Tróndur F. Johansen,
Sólbjørg Pedersen og Rói Eliasen • Prentsmiðja: Føroyaprent • 500 eintøk •
Faldarin finst eisini á heimasíðuni skjalasavn.fo. • ©Tjóðskjalasavnið

# Inngangur

Størsti parturin av almennum myndugleikum brúka í dag fulla talgilda málsviðgerð. Skjøl, ið eru talgild av uppruna, eru øðrvísi enn pappírsskjøl, á tann hátt, at tey ikki beinleiðis kunnu nýtast aftur, uttan ein brúkar eitt serligt kt-forrit.

Telduforrit eru undirløgd tí tøkniligu menningini, og dátur, ið verða gjørdar við hjálp av einum teldu-forriti til at kunna lesast aftur, kunnu ikki altíð lesast og brúkast aftur við nýtslu av einum øðrum forriti ella bara einari nýggjari útgávu av sama forriti.

Savnindi, ið eru talgild av uppruna, eru øðrvísi enn pappírssavnindi, á tann hátt, at tey eru goymd á miðlum, sum hava avmarkaða livitíð. Varðveitingin av talgildum skjølum er treytað av virknari varðveitingar-átaki, enn neyðugt er við pappírs-skjølum, um so er, at tey skulu kunna lesast og brúkast í framtíðini.

*Í hesari lítlu vegleiðing er endamálið:*

- At geva eitt yvirlit yvir, hvat hendir, tá ein myndugleiki skal avhenda eina kt-skipan, nevniliga at myndugleikin skal framleiða eina sokallaða talgilda skjalasavnsútgávu.
- At kunna um, hvussu ein avhending verður avgreidd.
- At svara teimum vanligastu spurning-unum, sum taka seg upp, tá ein myndug-leiki skal avhenda eina talgilda skipan.

*Vegleiðingin er grundað á:*
skjalasavnslógina og kunngerðir, rundskriv og vegleiðingar, ið finnast á heimasíðuni hjá Tjóðskjalasavninum og í lógarsavninum.

# Endamál

**Nakað um hugtøk, ásetingar og reglur.**

Hugtakið „almennur stovnur" fevnir um løgting og landsstýri og stovnar teirra, ríkisstovnar, kommunur og felagskommunur og kommunalar eins og felagskommunalar stovnar, stovnar við lógarásettum einarætti, sjálvsognarstovnar, og privatar stovnar sum heilt ella fyri meginpartin verða riknir fyri almennan pening, ella sum røkja uppgávur vegna tað almenna, sum av Tjóðskjalasavninum eru ætlaðar til at varðveita.

„Talgild skjøl" kunnu vera dátur í kt-skipanum við ella uttan skjøl, harumframt talgildar ljóð- og videofilur/sjónbandaðar filur. Ásetingarnar umfata eisini savnindi á pappíri ella øðrum miðlum, sum av Tjóðskjalasavnið, av varðveitveitingarávum, eiga at verða talgildað.

*Ein kt-skipan kann til dømis vera:*

- Skrásetingarskipan/Journalskipan
- Talgild máls-, skjala- og handfaringarskipan (TMSH-skipan)
- Talgild skjalahandfaringarskipan (TSH-skipan)
- Yrkiskervi/Fakskipan/Skráir
- Skipan samansett av dátum og møguliga skjølum frá fleiri skipanum í einum tænasturættaðum arkitekturi (SOA-skipan)

Ljóð og sjónbond í einum analogum formi kunnu talgildast, áðrenn avhending til Tjóðskjalasavnið, sbrt. fylgisskjali 5. Ásetingarnar í hesari kunngerð umfata einans savnindi, ið eru ætlað til varðveitslu hjá Tjóðskjalasavninum.

- Kt-skipanir hjá myndugleikum eru umfataðar av varðveitslu- og vrakingarásetingum, sum Tjóðskjalasavnið ásetur í sambandi við fráboðan um kt-skipan til Tjóðskjala-savnið. Ásetanir um ta einstøku kt-skipanina kunnu verða slignar upp í skjalasavnsdátugrunninum á heimasíðuni hjá Tjóðskjalasavninum, www.skjalasavn.fo.
- Ljóð- og sjónbond kunnu antin vera ein partur av eini kt-skipan ella vera sjálvstøðug savnindi. Um so er, at tey eru partar av einari kt-skipan ella ikki, eru tey umfatað av ásetingum um savnindi hjá Tjóðskjalasavninum.
- Kt-skipanir hjá stovnum og ljóð- og sjónbond eru umfatað av savninda- og vrakingarásetingunum hjá Tjóðskjalasavninum. Ásetingarnar kunnu síggjast á www.skjalasavn.fo.

# Hvat er ein talgild skjalasavnsskipan?

**Hvat er ein kt-skjalasavnsútgáva?**

Ein kt-skjalasavnsútgáva er eitt avrit av dátum frá einari kt-skipan hjá einum stovni við upplýsingum um skipanina og fílur, sum lýsa, hvussu dátur hanga saman. Skjalasavnsútgávan skal gerast í ávísum formati, so at hon kann goymast fyri eftirtíðina ella til framtíðarnýtslu. Tjóðskjalasavnið ásetur formatsnið í einari kunngerð ella rundskrivi. Myndilin niðanfyri vísir partarnar í einari skjalasavnsútgávu.

**Dátuinnihald**

Úttøka av tabellum og møguligum skjølum, ljóð, myndum og sjónbondum.

**Dokumentatión**

Fyrisitingarlig nýtsla av skipanini og tøknilig uppbygging.

**Dátubygnaður**

Samanhangur millum tabellir og møgulig skjøl, ljóð, myndir ella sjónbond.

# Fráboðan og góðkenning av kt-skipanum

### Hví skulu kt-skipanir fráboðast Tjóðskjalasavninum?

Kt-skipanir skulu fráboðast Tjóðskjalasavninum, soleiðis at Tjóðskjalasavnið kann gera eina meting av, um innihaldið í skipanini skal goymast fyri eftirtíðina. Vit goyma upplýsingar, sum skjalfesta, hvussu tann almenni myndugleikin hevur umsitið sítt tilfeingi og gjørt í mun til borgaran. Tilfarið kann brúkast til at skriva framtíðar søgu Føroya.
Tjóðskjalasavnið ger av, við støði í upplýsingunum í fráboðanini av kt-skipanini, um tilfarið í kt-skipanini skal varðveitast og sostatt avhendast sum eitt avrit til Tjóðskjalasavnið.

### Hvat skal boðast frá?

Allar kt-skipanir hjá myndugleikum, ið innihalda ella viðgera dátur, skulu fráboðast. Tað kunnu t.d. vera sokallaðar „talgildar máls- og skjalahandfaringarskipanir“ (TMSH-skipanir), dátugrunnar, hagtøl, SOA-skipanir ella jarðarmátingar, men eisini onnur sløg av skipaðum talgildum upplýsingum.

### Nær skulu kt-skipanir fráboðast?

Kt-skipanin skal fráboðast seinast tríggjar mánaðir, áðrenn skipanin verður tikin í nýtslu, soleiðis at Tjóðskjalasavnið kann náa at meta um, hvat skal varðveitast, áðrenn nýggja skipanin verður tikin í nýtslu og um neyðugt ávísa ella viðmæla hóskandi loysnir upp á tykkara skjalasavnspurningar.
Um so er, at grundleggjandi broytingar verða gjørdar upp á mátan, ið kt-skipanin skipar sínar upplýsingar, so skal skipanin endurfráboðast Tjóðskjalasavninum.

### Hvør skal boða frá kt-skipanini?

Tann myndugleikin, sum skal brúka skipanina, hevur ábyrgd av at boða frá skipanini. Um so er, at ein samtaksloysn, t.d. ein samskipan av fleiri deildum, ráðum ella stýrum, verður framd, er tað tann deildin, ráðið ella stýrið, ið hevur ábyrgd av íverksetanini, sum skal boða frá hesum. Tað skal síggjast í fráboðanini, hvør myndugleiki hevur ábyrgdina av skipanini.

### Hvussu skal boðast frá?

Skipanin skal fráboðast við oyðublaði, sum finst á heimasíðu Tjóðskjalasavnsins. Á oyðublaðnum eru nakrir spurningar, ið skulu svarast, og nevnd verða eisini nøkur skjøl, ið skulu sendast við fráboðanini.

# Fráboðan og góðkenning av kt-skipanum

### Hvat skal fráboðanin innihalda?

Allar fráboðanir skulu innihalda upplýsingar um, hvør brúkar kt-skipanina, hvat endamálið við skrásetingini er, hvat tað skal brúkast til, hvussu tilfarið verður brúkt osfr. Haraftrat skulu nakrar tekniskar upplýsingar gevast, sum lýsa, hvat slag av dátugrunni talan er um, hvørji dátusløg ganga inn í skipanina, hvussu kt-skipanin er tengd at øðrum kt-skipanum osfr. Skjøl við tekniskari skjalfestan av kt-skipanini skulu eisini sendast við.

### Um tykkara kt-skipan eisini skal góðkennnast?

Um so er, at Tjóðskjalasavnið ger av, at dátur frá tykkara kt-skipan skulu goymast, skal Tjóðskjalasavnið eisini góðkenna hana, áðrenn hon verður tikin í nýtslu. Í hesum føri fáa tit boð um hetta, og so skulu tit útfylla eitt góðkenningar-oyðublað, ið finst á okkara heimasíðu. Tað ber eisini til at útfylla bæði fráboðanar- og góðkenningar-oyðublaðið samstundis, soleiðis at vit kunnu avgreiða góðkenningina skjótari.

### Um skjøl ikki eru í skipanini?

Í teimum førum, har skjøl ikki eru í skipanini, minnir góðkenningaroyðublaðið nógv um fráboðanaroyðublaðið, men við størri denti á ta teknisku tilevningina av tykkara kt-skipan.

### Um so er, at skjøl eru í kt-skipanini?

Í teimum førum, har skjøl eru í skipanini, skal upplýsast um, hvørji ynski eru um tíðaravmarking í sambandi við afturvendandi avhending til Tjóðskjalasavnið. Ein vegleiðing, sum m.a. lýsir leiðreglurnar fyri, hvussu skjøl og møgulig mál verða skrásett í skipanini, hvussu góðskueftirlit verður framt osfr. Í oyðublaðnum er eisini møguligt at biðja um loyvi at vraka eina størri nøgd av skjølum í skipanini, um so er, at tit kunnu vísa á skipanarligar treytir fyri hesum.

### Hvørjar tekniskar upplýsingar skulu sendast við?

Teknisk skjalfesting, sum lýsir bygnaðin í rakstrarskipanini, skal sendast við. Um so er, at dátubygnaðurin í kt-skipanini er óvanligur, kunnu vit biðja um eina skitsu, ella lýsing av, hvussu tit hugsa tykkum, at skipanin kann konverterast til eitt avhendingarformat.

### Hvat hendir so aftaná?

Um so er, at vit meta, at dátur frá einari kt-skipan skulu varðveitast, skal ein dátuúrdráttur frá skipanini avhendast til Tjóðskjalasavnið. Tað verður vanliga gjørt, tá skipanin hevur verið virkin í fimm ár. Vit vísa á, hvussu dátuúrdráttur skal skipast og skjalfestast fyri at tryggja viðlíkahald og atgongd til upplýsingarnar nú og í framtíðini. Tá ein kt-skipan við skjølum hevur verið virkin í áleið tvey ár, seta vit okkum í samband við stovnin ella veitaran av skipanini fyri at hoyra, um skipanin verður brúkt á tann hátt, sum hon er lýst í fráboðanini. Um so er, at hetta ikki er so, tosa vit saman um, hvussu hetta kann rættast. Eftirfylgjandi verður avtala gjørd um ein myndil fyri avhendan av skipanini.

# Fráboðan og góðkenning av kt-skipanum

## Hvat skal avhendast til Tjóðskjalasavnið?

Allir stovnar skulu boða Tjóðskjalasavninum frá, áðrenn tey taka nýggjar kt-skipanir í nýtslu. Tjóðskjalasavnið metir um – út frá fráboðani, um avhendast skal eitt avrit til savnið, og hvussu og nær avhendast skal fyrstu ferð. Hetta verður avgjørt í einari áseting um varðveiting. Síðani, tá ið avhendingin skal fara fram, seta vit okkum í samband við tykkum.

## Hvør framleiðir skjalasavnsútgávuna?

Tit kunnu fáa ein veitara uttanífrá til at gera ella avgreiða tann tekniska partin av uppgávuni, ella tykkara egnu kt-deild. Kt-veitarin ella deildin skal avhenda eina tekniska dokumentatión av kt-skipanini, draga út dátur úr kt-skipanini, syrgja fyri at konvertera til røttu formatini og samla dátur og dokumentatión til eina skjalasavnsútgávu.

## Avhendan av kt-skipanum?

Tá avgerð er tikin um at varðveita dátur frá eini kt-skipan, skal myndugleikin avhenda eitt avrit (skjalasavnsútgávu) til Tjóðskjalasavnið. Hetta skal gerast í seinasta lagi áðrenn tey verða strikað, ella tá dátur ikki verða brúktar longur í fyrisitingarligum høpi.

Myndugleikar, sum arbeiða við upplýsingum, ið eru umfataðar av Persónupplýsingarlógini, og sum skulu varðveitast, skulu avhenda savnindini til Tjóðskjalasavnið.

Ein skjalasavnsútgáva av dátum og skjølum, ið eru verd at varðveita, skal framleiðast í seinasta lagi, tá dátur skulu strikast sambært boðum frá Dátueftirlitinum. Dátur mugu ikki strikast, fyrr enn tær eru framleiddar í einari skjalasavns-útgávu, ið er góðkend av Tjóðskjalasavninum. Møguligt er eisini at avtala eina serliga tíðarfreist, til dømis í sambandi við eitt skifti av journalskeiði, ella tá kt-skipanir verða niðurlagdar.

## Hvør skal gjalda?

Myndugleikin skal sjálvur gjalda fyri útreiðslurnar, ið eru knýttar at avhendingini av kt-skipanini. Tjóðskjalasavnið arbeiðir fram ímóti at gera avhendingina so lætta og smidliga sum møguligt, og at fáa kostnaðin niður. Tit kunnu stuðla hesum arbeiði við at senda okkum upplýsingar um kostnað og tíðarnýtslu í sambandi við avhendan av kt-skipanini. Hetta verða tit biðin um, tá ið vit senda tykkum endaliga góðkenning av skjalasavnsútgávuni.

# Hvussu gongur eitt avhendingarmál fyri seg?

**Soleiðis er mannagongdin**

1. Tjóðskjalasavnið sendir hvørt ár eitt rundskriv um tær skipanir, sum skulu lata inn dátur til Tjóðskjalasavnið. Hetta gevur møguleika fyri at leggja upp fyri kostnaðinum.

2. Vit byrja eitt avhendingarmál við at skriva til tykkum.

3. Vit hava fund við tykkum og røða um dátuinnihald og dokumentatión av skjalasavnsútgávuni. Á fundinum avtala partarnir eina tíðarætlan.

4. Vit flýggja út eina avhendingaráseting, ið ásetur innihaldið í skjalasavnsútgávuni og avhendingardagfesting.

5. Tit senda okkum dokumentatión til góðkenning.

6. Tit taka út dátur frá skipanini og framleiða eina skjalasavnsútgávu, møguliga við hjálp frá kt-veitara.

7. Tit, ella tykkara kt-veitari, testa eina skjalasavnsútgávu við testforritinum Ada.

8. Tit lata skjalasavnsútgávuna inn til Tjóðskjalasavnið – antin persónliga ella við at senda hana sum innskrivað sending.

9. Vit kvitta fyri avhendingina.

10. Vit testa skjalasavnsútgávuna og góðkenna hana, tá allar ásetingar er hildnar.

# Góðskutrygging í kt-skipanum

Orðið „góðska“ verður brúkt í ymiskum høpi og kann hava ymiskan týdning. Í hesum høpi snýr góðska seg um, at tað er møguligt at finna dátur og skjøl aftur í kt-skipanum hjá kommunalum stovnum og, ríkis- og landsstovnum.

Góðskueftirlit skal tryggja, at skrásetingar í skipanum eru rættar, og at tað er møguligt at leita fram tær røttu upplýsingarnar. Tað kann til dømis vera eitt gott hugskot at eftirkanna, um t-postsamskifti hava sigandi heiti fyri innihaldið, ella um tey eru skrásett við tí sjálvirkandi ’SV:SV:SV: spurningur um x-mál’. Ella hava eftirlit við, at tað einans verða goymdar loyvdar fílur, soleiðis at skjølini kunnu latast upp og lesast.

## Góð ráð um góðskutrygging

Góðskutrygging er ikki bert góðskueftirlit. Góðskutrygging snýr seg eisini um, at atlit verður tikið til hetta, longu tá ein nýggj skipan verður keypt, og til hon skal latast aftur.

## Áðrenn skipanin verður tikin í nýtslu

Tað eru nógv viðurskifti at taka atlit til og kanna, tá hugsað verður um at útvega eina nýggja kt-skipan, men í mun til góðskueftirlit verður viðmælt at kanna:

### *Sjálvvirkandi arbeiðsgongdir*

Mál og/ella skjøl verða stovnað við ymiskum sjálvvirkandi metadátum, til dømis dagfesting, partur, skrásetingarskipan. Tað kann til dømis vera skjalaskabelónir, har navn, dagfesting, skrásetingarsystematikkur verða stovnað sjálvvirkandi. Tað er eisini ein fyrimunur at hyggja nærri at skrásetingarsystematikkinum:
Eru málsbólkar/fasettir har, sum hava sama slag av málum, sum við fyrimuni kundu havt sjálvvirkandi mannagongd? Spurningurin er: Hvat kann skipanin – og hvat kann lata seg gera í mun til tykkara málsskipan.

### *Útskriftir frá skipan*

Nógvar skipanir hava eitt útskrivingarmodul, sum vanliga verður brúkt til leiðslufrágreiðingar. Tað er væl egnað til góðskueftirlit.
Tað kunnu bæði verða fastar, áðrenn skilgreinaðar útskriftir, til dømis ‘øll skjøl uttan málstilknýti’ ella útvaldar metadátur. Dátur kunnu setast í eitt rokniark, har tær síðani kunnu flokkast og viðgerast sum einum lystir.

### *Undirvísing í tí nýggju skipanini*

Undirvísast skal ikki bert í teimum ymisku funktiónunum í nýggju skipanini. Stórur fyrimunur er eisini at undirvísa í felags leiðreglum fyri stovnan av málum, journalisering, navnaskráseting og annað tílíkt. Gerið eina undirvísingarmannagongd, har tit bæði ástøðiliga og verkliga viðgera eina málsgongd.

# Góðskutrygging í kt-skipanum

*Stuðul frá leiðsluni*
Tað er neyðugt, at leiðslan verður tikin við í góðskutrygging longu frá byrjan. Tað besta er, at tað kann avtalast ein gongd, har tað javnan verður send frágreiðing til leiðsluna, hvussu tað gongur við góðskuni av skrásetingunum. Tað skal vera sjónligt, at leiðslan roknar við, at starvsfólk brúka tíð upp á hesa arbeiðsuppgávu. Lat til dømis tann ábyrgdarhavandi stjóran innleiða undirvísingina.

*Leiðreglur fyri nýtslu*
Gerið og haldið felags leiðreglur fyri, hvussu tit brúka og skráseta í skipanini – við stuðli frá leiðsluni!

## Tá skipanin er virkin

Tað er, meðan skipanin er virkin, at góðskutryggingin er týdningarmikil. Kannið so hvørt, um skrásett er rætt í skipanina, at dátur og skjøl hava góða góðsku. Soleiðis ber til so hvørt at rætta møguligar feilir, og rætta møguligar óvanar, sum hava sníkt seg inn í skrásetingarnar hjá starvsfólkunum.

Tað er gott við fastari mannagongd fyri góðskutrygging, so at tað ikki skal kroystast inn í ein skundmiklan og strævnan gerandisdag. Tvs. ein føst mannagongd fyri, hvat tit kanna, hvussu ofta og hvør ger tað.

## Aftaná – tá skipanin verður latin aftur

So er seinasti møguleiki at rudda upp! Hvussu stórt uppruddingararbeiðið verður, veldst um, hvussu nógva tíð og orku tit hava brúkt at røkja skipanina, og um góðskueftirlit hava verið gjørd regluliga.

Tit skulu m.a. kanna hesi viðurskifti:
- Eru málini latin aftur?
- Er góðskutrygging framd við afturlating?
- Eru skjøl uttan tilknýti til mál?
- Eru øll skjøl skrásett. Manglar nakað, t.d. frá felagsdrevinum, teldupostinum v.m. í skipanini? Er skjalfestan!
- Um søkt verður um atgeingi um 10 ár, eru tit so vís í, at alt viðkomandi tilfar er skjalfest í rætta málinum
- Kunnu øll skjøl latast upp og lesast?
- Fíluformat– eru øll fílusløg í skipanini loyvd?

Minnist til, at skipanin framhaldandi skal kunna brúkast – fjølmiðlarnir og borgarin hugsa ikki um journalskeið í skipanini!

**Meiri tilfar er at finna á heimasíðuni: skjalasavn.fo**

# Les meira um:

*skjalasavnslógina,*
*reglur,*
*rundskriv og*
*vegleiðingar*

**á okkara heimasíðu:**

**skjalasavn.fo ella archives.fo**